# Krabbameinsútgreining
# Illgruni um krabba í brisi (pancreas), gallagongd og livur

## Sjúkueyðkenni, ið geva illgruna um krabba í brisi, gallagongd og livur

Sjúklingar við krabba í brisinum og gallagongd hava ofta ógreið almenn sjúkueyðkenni, sum vekttap, maga- og ryggjapínu, vaml og møði. Hesi sjúkueyðkenni eru somikið ógreið og trupul at knýta at einum organi, at sjúklingarnir javnan verða ávístir og útgreinaðir í fyrstu atløgu við illgruna um krabba við ókendum uppruna.

Summir sjúklingar við krabba í brisinum og gallagongd hava ikterus sum fyrsta greiða sjúkueyðkenni.
Um eingin greið orsøk er til ikterus og illgruni er um krabba, eigur sjúklingurin at verða ávístur til krabbameinsútgreining.

Livurkrabbi sæst oftast hjá sjúklingum við kroniskum livrasjúkum. Illgruni um primeran livrakrabba íkemur, tá funnið verður ein fokal, føst ífylla við skanning (UL/CT/MR). Tó ikki, um talan er um upplagda benigna ífyllu.

## Treytir fyri ávísing til krabbameinsútgreining

Ávísing skal sendast til krabbaútgreining um minst ein av hesum treytum er lokin:

- Ikterus uttan upplagda benigna orsøk
- Ífylla ávíst í brisi, tólvfingurtarmi ella í periampullæra økinum, gallagongd og/ella livur við myndamodaliteti*
- Ífylla við ógreiðum uppruna í brisi ávíst á skanning
- Sjúklingar við illgruna um residiv av krabba í brisi, livur ella gallagongd

*Upplagdar benignar ífyllur í livrini skulu ikki ávísast til krabbameinsútgreining.
Illgruni um metastasur í livur skulu ávísast til útgreining fyri krabba við ókendum uppruna.

## Handfaring av residiv ella progressión

Í uppfylgingartíðarskeiðnum: Um sjúkueyðkenni, ið benda á residiv ella progressión, skal vísast til deildina/eindina, ið fylgja sjúklinginum.
Um illgruni er um residiv, tá sjúklingurin ikki verður fylgdur longur, skal sjúklingurin ávíst av nýggjum til krabbameinsútgreining fyri krabba í brisi, gallagongd og livur

## Ávísingin

Útfyll vinarliga ávísingarfrymilin "Illgruni um krabba í brisi, gallagongd og livur" undir móttakandi eindini "Krabbaútgreining" í Cosmic. Lýs støðuna undir aktuelt - íroknað nær sjúkutekini eru íkomin v.m.
Orða vinarliga ávísingina so neyvt, at tað er lætt hjá serøkinum at visitera og bíleggja viðkomandi kanningar, so útgreiningartilgongdin verður so skynsom sum gjørligt.

Útgáva januar 2026